## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av suðri, um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og stundum regn. Út á seinnapartin støkkur hann vesturum til útsynning og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin eitt skifti regn. Hitin millum 7 log 10 stig.

**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

# Ær lembt fýra lomb

**Hetta er ein stak ær, tí hóast hon bara er sjey ára gomul, hevur hon longu havt heili 17 lomb**

LEMBING
*Áki Bertholdsen*

Hov: At ær lemba tvey lomb er ikki óvanligt. Einstakar ferðir kemur tað eisini fyri, at ær lema trý lomb. Men at ein ær lembir fýra lomb - og at tey øll harafturat liva -man vera ómetaliga sjáldsamt,
Men kortini var tað júst tað sum hendi í Hovi sunnudagin.

Tað er Jóxsvein Petersen í Hovi, sum eigur hesa sjáldsomu ærina.

Hann sigur, at hetta hevur altíð verið ein stak ær.

Hóast hon bert er sjey ára gomul, hevur hann longu fingið heili 17 lomb undan henni.

Tá ið honm var lamb í 1996, lembdi hon eitt lamb. Men bæði í 1997, 1998 og 1999, lembdi hon tvey. Bæði í 2000 og í 2001 lembdi hon trý og í ár lembi hon so fýra.

Bara eitt lamb undan henni er deytt, tað var í fjør, tá ið tað eina datt í eina lítla á og slapp ikki uppaftur.

Jósvein Petersen sigur, at tað er ikki bara tað, at hann hevur fingið nógv lomb undan ærini. hon hevur eisini klára at føtt lombini, tí hon hevur havt ov mikið at geva. Lombini hava eisini verið avbera góð, tá ið tey hava verið dripin.

Tey bæði lombini, sum hann drap undan henni í fjør vigaði ávikavist 39 og 42 pund. Í fyrrárið gekk hon við øllum trimum lombunum og tá drap hann tvey av teimum og tey vigaði eisini um 40 pund hvørt. Tað triðja lambið varð vigað livandi og eftir tí var krovið mett til eini 35 pund.

Sostatt hevði hann tað eina árið havt fingið góð 100 pund av kjøti undan hesi eini ærini og tað kann ikki annað enn sigast at vera avbera gott.

Í ár eru øll fýra lombini gimburlomb, men hann hevur tikið tað eina lambið frá henni til eina aðra ær,. sum misti lambið.

– At hon gongur við trimum lombum man vera ríkiligt, men tey klárar hon so eisini at føða bæði væl og virðiliga, tí tað hevur hon gjørt fyrr við góðum úrslitið og tey trý lombini, hon nú hevur hjá sær, trívast og hava tað gott, sigur Josvein Petersen.

Men hann sigur eisini, at hann ger rættiliga væl við ærina fyri at fáa hana at føða lombini. Hon gongur í stiki og hon fær kraftfóður afturat, men so stendur heldur ikki á, at føða lombini. Annars gongur hon í haganum um summarið, men er við hús um veturin.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Jósvein Petersen hevur sermerkt seyðahald. Fyri nøkrum árum síðani hendi tað hjá honum, at tíkin tók eitt lamb til sín sum sín egna hvølp og læt eisini lambið súgva seg, men tey vildu heldur geva lambinum kipp ístaðin.



*Sunnudagin hendi tað avbera sjáldsama, at ein ær í Hovi lemdi heili fýra lomb og tey liva øll. Her gongur hon í einum stiki við øllum fýra lombunum*




### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷3 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 11 |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 14 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 18 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 33 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1008 hPa. sunnan fyri Ísland grynnist og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina. Hátrýstið við Vestur-Noreg fer suðureftir.




Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/04 kl. 06[00]– 18/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,2°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/04 kl. 06[00]– 18/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 35,1 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

10. apríl: Mánin longst frá jørðini
12. apríl: Tendring
20. apríl: Fyrra kvarter
25. apríl: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna— sundi fp. | sp. | Mykines— firði fp. | sp. | Nólsoyar— firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna— sundi fp. | sp. | Fugloyar— firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. apr | — | 12.21 | 11.21 | 23.47 | 11.36 | — | 01.56 | 14.21 | 02.56 | 15.21 | 10.36 | 23.02 | 09.36 | 22.02 | 00.11 | 12.36 | 01.11 | 13.36 | — | 12.06 | 00.56 | 13.21 |
| 20. apr | 00.47 | 13.27 | — | 12.27 | 00.02 | 12.42 | 02.47 | 15.27 | 03.47 | 16.27 | 11.42 | — | 10.42 | 23.22 | 01.02 | 13.42 | 02.02 | 14.42 | 00.32 | 13.12 | 01.47 | 14.27 |
| 21. apr | 02.07 | 14.47 | 01.07 | 13.47 | 01.22 | 14.02 | 04.07 | 16.47 | 05.07 | 17.47 | 00.22 | 13.02 | — | 12.02 | 02.22 | 15.02 | 03.22 | 16.02 | 01.52 | 14.32 | 03.07 | 15.47 |
| 22. apr | 03.27 | 15.52 | 02.27 | 14.52 | 02.42 | 15.07 | 05.27 | 17.52 | 06.27 | 18.52 | 01.42 | 14.07 | 00.42 | 13.07 | 03.42 | 16.07 | 04.42 | 17.07 | 03.12 | 15.37 | 04.27 | 16.52 |

5 707265 100050